# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

# Jákup Sólstein leggur frá sær

Seinasta fríggjadag var móttøka á skrivstovuni hjá Føroya Reiðarafelag í Gongini í samband við, at Jákup Sólstein tann dagin legði frá sær sum formaður í felagnum. Hann hevur verið nevndarlimur og formaður í eini 25 ár.

Her var nógv fólk til staðar. Sum rímiligt er vóru nógvir reiðarar. Eisini vóru fólk, sum Jákup so ella so hevur havt samband við í sínum yrki. Hetta vóru landsmyndugleikar, manningarfeløg, fiskirannsóknarstovan og onnur.

Tað vóru fleiri røður. Millum hesar var Óli Jacobsen, Bjørn Kalsø, landsstýrismaður, Atli Hansen, fyrrverandi formaður fyri felagið Nótaskip og Kaj P Mortensen, fyrrverandi aðalstjóri i fiskimálaráðnum.

Allir góvu Jákupi tað ummæli, at hann hevur verið eitt gott umboð fyri reiðarar. Jákup hevur verið ein góður samráðingarmaður. Hann kundi vera kontantur, men var eisini tann, sum vildi og kundi finna semjur. Felagið hevur eisini ment seg í hansara tíð, seinast við teirri umskipan av felagnum, sum júst var samtykt hendan dagin.

Vit vóru við til móttøkuna.

**ó.**



*Jákup Sólstein er giftur við Borgarghjørt Huus, sum er ættað úr Syðrugøtu*



*Poul Hansen nevndarlimur og Regin Nónstein, umboðandi Føroya Skipara- og Navigatørfelag*



*Johannes Olsen og Henrik Old, formaður í vinnunevndini*



*Tríggir fyrrverandi formenn í Reiðarafelagnum vóru eisini møttur. Teir eru f.v. Eiler Jacobsen, Osmundur Justinussen og Aksel Hansen, sum var formaður í 60-unum. Umframt teir er ein fyrrverandi formaður á lívi, og tað er Svend Thulesen, sum býr í Danmark*



*F.v. Anfinn Olsen, Kristian Martin Rasmussen, Tormóður Djurhuus, fyrrverandi skrivari í reiðarafelagnum og Ólavur Petersen*



*Marner Lisberg og Jákup Sólstein*



*Tann sum hevur havt samskifti við Jákup Sólstein eina longst man vera Óli Jacobsen, sum her sigur nøkur orð.*



*Bjørn Kalsø, landsstýrismaður, Arni Hansen og Hildibjartur Johansen, stjóri í Lønjavningargrunninum í nógv ár*



*F.v. Hjalti í Jákupsstovi, Atli Hansen, Terji Sigurðsson, semingsmaður, Gudmund Mortensen og Árni Dam*